## DAGSINS MEINING

# Valið er sera einfalt

Kanningar í øðrum londum vísa, at tveir triðingar av veljarunum taka undir við grundsjónarmiðunum í javnaðarhugsjónini. Henda byggir á samhaldsfesti og frælsi hins einstaka. Høvuðsverkið í øllum javnaðarpolitikki kring allan vesturheimin var at slóða fyri og byggja upp vælferðarsamfelagið.

Grundstólparnir í tí eru almanna-, heilsu- og skúlaverkið. Øll hava rætt til hesar tænastur uttan brúkaragjøld. Og tað skulu allir borgarar hava, siga javnaðarflokkar. Afturímóti royna borgarligir flokkar at einskilja og leggja vælferðartænstur út til privatar fyritøkur at reka.

- Men er tað ikki rættast, at felagsskapurin hjá tær og mær – samfelagið – er best førur fyri at reka hesar tænastur uttan vinningur er endamálið? Spurningurin at verja og seta betri skorar undir vælferðarsamfelagið, sum allur heimurin misunnir Norðurlondum og Vesturevropa, er galdandi á øllum valum. Eisini á valinum í dag!

Hin høvuðsspurningurin á valinum er ríkisrættarliga støða Føroya. Seinastu veljarakanningarnar geva Tjóðveldinum og Sambandinum bestu undirtøkuna. Men føroyski veljarin eigur at geva sær fær um, at fáa vit eitt sterkt "tjóðveldi" og eitt sterkt "samband", hendir einki í hesum stóra máli.

Bara ein fjórðingur av føroyingum tekur undir við fullveldisætlanini. Og bara eini 15 prosent vilja halda fast um verandi heimastýrisskipan. Afturímóti ér tann stóri meirilutin sinnaður fyri øktum sjálvstýri. Henda leið er politikkur javnaðarfloksins.

Javnaðarflokkurin vil hava ein nýggjan og greiðan sáttmála millum Føroyar og Danmark sum javnbjóðis lond. Vit byggja ikki land við at ganga fram í blindum, men einans við skynsemi og loysnum millum fleiri flokkar og donsku stjórnina. Undirlutakenslur og konfrontatión leggur ikki grund undir eina haldgóða politiska loysn og skipan.

Havið hesar spurningar í huga, tá krossurin skal setast í dag!

Valstríðið hevur verið hampiligt, men á valfundinum sunnukvøldið kundu sjálvt siðiligir politikkarar bara sær. At politiski leiðarin í Fólkaflokkinum tók Jerusalem og PLO fram sigur bara, at har stendur á gomlum naglum. At formaðurin í Sambandsflokkinum heitti á fólk um ikki at velja Javnaðarflokkin vísir, at Sambandsflokkurin hevur framvegis ein leiðaratrupulleika, og at flokkurin er ikki førur fyri at leiða samráðingar um ein nýggja sjórnarskipan millum Danmark og Føroyar. Lænið tí ikki Sambandinum ella Tjóðvedinum atkvøðuna í dag. Valið er ikki ein fólkaatkvøða um loysing ella samband!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Amerada Hess leitibrunnur 6004/16-1z

TÍÐINDASKRIV FRÁ OLJUMÁLASTÝRINUM

Seinnapartin 16. november steðgaði boripallurin Sovereign Explorer boringini av brunni 6004/16-1z í loyvi 001 hjá Faroes Partnership samtakinum við Amerada Hess sum fyristøðufelag. Í løtuni verða royndir tiknar og seinastu mátingarnar gjørdar í brunninum, áðrenn hann verður læstur.

Fyribils úrslitið av boringini vísir, at brunnurin inniheldur týðandi nøgdir av kolvetni, bæði løtt olja og gass. Samlaða tjúgdin av kolvetnisberandi fláunum er á leið 170 metrar.

Einki kann enn sigast um nøgdirnar av kolvetnum á staðnum. Tá loyvishavarin hevur fingið viðgjørt boriúrslitini út í æsir - í seinasta lagi 8 mánaðar eftir, at brunnurin er stongdur - skal ein frágreiðing um endaligu úrslitini av boringini latast Oljumálastýrinum saman við eini ætlan fyri, hvørji tiltøk skulu gerast tey komandi árini fyri at staðfesta, um fundurin er rakstrarverdugur.



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum*

Brunnurin, sum er á 975 metra dýpi, røkkur 4246 metrar undir sjóvarmálan. Sambært loyvistreytunum skuldi brunnurin borast niður á 3800 metrar. Eftir at uppruna leitimiðini vístu smærri nøgdir av kolvetni, samstundis sum tekin vóru um, at størri nøgdir av kolvetni kundu finnast djúpari niðri, søkti Faroes Partnership um loyvi at bora víðari. Brunnurin endar í jarðløgum frá eldra partinum av paleocen tíðini.

Eyðun Elttør, landsstýrismaðurin í oljumálum sigur:

"Góða úrslitið av hesum brunninum hevur stóran týdning fyri Føroyar sum komandi oljuøki. Tó mugu vit ásanna, at vit ikki enn vita um kolvetni er funnið í rakstrarverdum nøgdum. Ein spennandi tíð liggur fyri framman hjá øllum loyvishavarum við eftirmeting av rúgvismikla jarðfrøðiliga tilfarinum, sum er fingið til vega við boringunum í summar. Vónandi kann tað verða við til at finna nýggj leitimið til framtíðar boringar."

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Oljumálastýrið,
telefon 35 70 70
www.oms.fo

# Rentulækking á bilfígging

TÍÐINDASKRIV

Tryggingarfelagið Føroyar setir nú rentuna á bilfíggingini niður frá 6,25 % p.a. til 6,0 % p.a. frá í dag, tann 15. november 2001, at rokna. Henda renta er galdandi fyri allar bilfíggingar uttan mun til aldur á bili og støðd á útgjaldi.

Lækkingin er ein avleiðing av, at rentan á fíggjarmarknaðinum sum heild er lækkað, síðani Tryggingarfelagið Føroyar seinast lækkaði rentuna tann 1. oktober 2001.

Bilfígging frá Tryggingarfelagnum Føroyar verður avgreidd beinleiðis á bilasøluni.

*Tórshavn, tann 15. november 2001*
**Tryggingarfelagið Føroyar S/F**

**Gunnar í Liða**
**forstjóri**




Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## VIÐMERKINGAR

# Aftursvar til Terja Rasmussen um Rás 2

**Petur Jacobsen**
*Stjóri á Rás 2 og limur í Koda*

At Rás 2 ikki vil gjalda er ikki satt. Vit hava goldið nógvar pengar til Koda, sum tú helst onki - eftir verandi skipan - hevur fingið ella fært av.

Ósemjan millum Koda og Rás 2 er í stuttum, at vit spurdu, um hvar pengarnir fóru, sum m.a. vit gjalda fyri at spæla tónleik, tí fleiri tónasmiðir gjørdu vart við, at teir lítið og onki fingu frá Koda. Somuleiðis spurdu vit um heimildina hjá teimum at krevja umleið tvær milliónir krónur úr Føroyum, og at fáa at vita, hvussu nógv kemur aftur til Føroya.

Vit noktaðu at gjalda, til vit fingu svar frá Koda og bjóðaðu okkum at koma á fund við teir um hesu viðurskifti.

Svarið kom - satt at siga - frá fútarættinum: "Blandið tykkum uttanum, betalið, ella tit fáa fútaforboð fyri yvirhøvur at senda." Hótt varð við at kvetta leidningar, leggja hald á teldur, mixipultar o.a. - Kanska onkur kennir tónalagið aftur, "Harraboð!" Ein ósek fyritøka ber seg ikki soleiðis at. Tað var ein stórur sigur fyri demokratiið, at fútin ikki lat seg misbrúka av Koda.

Eg havi loyvt mær á fundi tann 10. november í Felagnum Føroyskum Tónaskøldum at leggja uppskot fram um at stovna ein føroyskan grunn, sum útvørp og onnur gjalda til. Hetta verður brúkt í Íslandi - og sum so verður býttur ímillum føroyskar tónleikarar og tónasmiðir. Hetta er ikki tí, at Rás 2 skal sleppa bíligari, men at pengarnir, sum vit gjalda, ikki fara til danskar artistar ella nakrar fáar her, sum kanska ikki hava pengarnar uppibornar.

Latið okkum brúka kreftir uppá at gera tað liviligari hjá føroyskum tónleikarum og smiðjum, heldur enn at mobilisera seg ímóti Rás 2. Latið okkum arbeiða saman, umsita okkara egnu pengar. So er helst meir enn ein millión krónur um árið at býta ímillum tónleikarar, sum virka og búgva her á landi. Klandur og stríð, Terji, tað er tað vit minst hava brúk fyri nú. Eg sum persónur kann liva uttan Rás 2, og Rás 2 kann eisini liva uttan at spæla tín tónleik, men tað hevði nú verið spell, um vit hildu uppat at senda. Tað fara helst at ganga nógv ár, til nakar aftur fer í holt við eina slíka rás, um hendan gevst.

Vit hava í tvey ár lagt sera nógv arbeiði í Rás 2. Hvør dagur er eitt tógvið stríð. Tað er altíð léttari at bróta niður enn at byggja nakað upp. Mær tykir, at tú leggur heldur eftir mær sum persón. At tað so skal ganga út yvir Rás 2 og alt tónleikalívið í Føroyum er ikki nøkrum at gagni.

Eg veit ikki, hvussu tú skalt fáa fólk at keypa tínar útgávur, samstundis sum tín missión er at takað Rás 2 frá somu fólkum. Tað má vera ein ivasamur heiður.

Tú berjist fyri eini skipan, har umleið 10 prosent av tí, sum Rás 2 skal gjalda, kemur aftur til Føroya, heldur enn at vera við til at bøta um korini til frama fyri allar partar.

Hevði tú sett teg inn í málið, ivist eg ikki í, at sjálvt tú hevði tikið undir við míni áskoðan, og tú ert vælkomin at seta teg í samband við meg um hesi viðurskifti.

# Sambandspolitikkur er framtíð Føroya

**Flemming Mikkelsen**



Undanfarna valskeið (1994-98), tók Sambandsflokkurin enn einaferð aftur um endan, og var við at endurreisa føroyska samfelagið, sum búskaparliga hevði rent seg fast.

Kreppan seinast í 80-unum og í byrjanini av 90-unum var uttan iva tann svárasta í føroyska samfelagnum í nýggjari tíð.

Føroyska samfelagið var niðurbundið av skuld og vónloysi.

Tá valskeiðið var runnið, kundi staðfestast, at stóra uppgávan Sambandsflokkurin átók sær leiðsluna av, varð loyst bæði væl og virðiliga. Politiskt vóru Føroyar so frælsar sum ongantíð fyrr, og búskaparliga hevur Føroya land valla nakrantíð verið betri fyri.

Verandi samgonga kom bókstaviliga til skorin klæðir og búgvið borð, men við sínum einvísa og forstokkaða fullveldispolitikki, er landsstýrið við at spæla okkum øll kort av hondini.

Tað er uppá hægstu tíð, at veljarin setur teimum stólin fyri hurðina. Tað kann gerast 20. november.

Sambandsflokkurin hevur tað besta politiska tilboðið. Flokkurin hevur greiðar linjur og eina krystalklára valskrá til fólkatingsvalið.

Við sínum nýskipanaruppskoti er flokkurin til reiðar at tingast við danir um eina politiska nýskipan landanna millum, men tað er sjálvandi treytað av, at flokkurin fær umboð á fólkatingið til komandi fólkatingsval.

Velur tú Sambandsflokkin, hevur tú møguleikan at gerast partur av einum størri ríki, og samstundis stýra tínum egna landi. Hvat meira kanst tú ynskja tær ?

Sambandsflokkurin er framtíð Føroya. Persónliga frælsið og vælferð Føroya fólks er sett í fremstu røð. Her skal vera gott at búgva, ikki bert fyri tey fáu, men okkum øll.

Avgerðin er okkara.

# Blokkurin hóttir vælferðina

**Finnbogi Ísakson**



Eftir uppskoti frá Landsstýrinum hevur Løgtingið samtykt at fremja nakrar yvirtøkur sambært heimastýrislógini. Tann størsta yvirtøkan, sum fær gildi 1. januar komandi, er skúlaverkið.

Kostnaðurin av teimum yvirtøkum, sum verða framdar frá og við komandi ári, er stívliga 350 mió.kr. Hetta hevur við sær, at blokkstuðulin úr ríkiskassanum minkar samsvarandi.

Fleiri hava ført fram, at tað er ein vanlukka fyri føroyska samfelagið, at blokkurin minkar. Hetta fer at renna vælferðarsamfelagið um koll, verður sagt.

Hetta er ikki rætt. Fremsta treytin fyri einum vælferðarsamfelagi er trygd. Ikki einans trygg verja móti hernaðarligum álopum, men uppaftur meira trygg búskaparlig viðurskifti.

Okkara samfelag hevur ein eintáttaðan búskap. Fiskivinnan er næstan tað einasta, vit byggja okkara vinnu á. Ein ávísur ótryggleiki ger seg tí meira galdandi hjá okkum enn í samfeløgum við meira fjøltáttaðum búskapi.

Men oman á hesa óvissuna kemur tann ótrygd, sum blokkstuðulin hevur við sær í "góðum tíðum" (tað eru tíðir, tá fiskiskapurin er góður og marknaðarprísurin høgur). Tí treytin fyri, at vit framhaldandi kunna fáa blokkstuðul er, at vit føroyingar kunna prógva, at vit hava brúk fyri honum. Og fyri at prógva tað er neyðugt at tøma landskassan eina ferð um árið.

Er yvirskot í landskassanum ár um ár, td. einar 500 mió.kr, fer danska stjórnin sjálvandi at gera vart við, at vit hava ikki brúk fyri stuðlinum. Stjórnin og Fólkatingið kunna heldur ikki forsvara mótvegis danska fólkinum, at teir árliga veita føroyingum eina miljard í stuðuli, sum føroyingar heilt ella partvíst seta inn á bók ella í virðisbrøv.

Tað er sostatt sum nevnt neyðugt hjá okkum at tøma landskassan eina ferð um árið, eisini um hetta hevur við sær, at okkara búskapur verður yvirupphitaður. Henda yvirupphiting kann sum frálíður fáa katastrofalar avleiðingar fyri samfelagið líkar teimum, sum hendu okkum fyri 8-10 árum síðani.

Hvar er vælferðin tá?

Veruleikin er, at blokkstuðlin - í hvussu so er undir verandi skipan - er ein hóttan móti vælferðini.

# Yvirlýsing frá valevnum Miðfloksins til fólkatingsvalið

Í sambandi við veljarakanning hjá Sjónvarpi Føroya, sum varð almannakunngjørd í gjárkvøldið, átalar Miðflokkurin mannagongdina hjá Sjónvarpi Føroya í hesum máli. Kanningin er gjørd, áðrenn framløgusending Miðfloksins í Útvarpi Føroya varð send leygarkvøldið. Kanningin varð gjørd leygardagin millum kl. 14.00 og 18.00, tvs, eftir at allir hinir flokkarnir høvdu havt sína framløgusending enntá við endursending.

Tað er átaluvert, at ein fjølmiðil, fíggjaður við skattgjaldarans pengum, soleiðis tilsíðissetur Miðflokkin og veljarar hansara. Slíkur atburður er ósømiligur og økir ikki um trúvirðið hjá einum almennum fjølmiðli, sum eigur og skal vera politiskt óheftur og eigur at røkja áhugamálini hjá øllum borgarum eins.

Somuleiðis vísir Miðflokkurin á tað undrunarverda í, at Sjónvarp Føroya sum sokallaður politiskt óheftur stovnur gav ávísum politiskum flokkum betri sømdir til kjaksendingarnar í farnu viku enn Miðflokkurin fekk. Miðflokkurin metir atgerð Sjónvarpsins sum eina beinleiðis valdsmisnýtslu, sum léttliga kann mága støðið undan demokratiska rættinum hjá vanliga borgaranum at bera fram síni sjónarmið.

Vísandi til omanfyristandandi umhugsar Miðflokkurin at fáa málið lagt fyri umboðsmannin til metingar.

*Sunnudagin, hin 18. november 2001*
***Valevnir Miðfloksins til fólkatingsvalið***

**Jenis av Rana**
**Tordur J. Niclasen**
**Álvur Kirke**
**Bill Justinussen**
**Svein Askildsen**
**Bjørg av Rana Nietschke**
**Anna Dam**